# Innrás í Vágum

**– Tað var ordiliga stutligt. Akkurát sum á jólum, helt okkurt av handilfólkunum í Vágum fyri hósmorgunin, tá fregnast varð um, hvussu gekst mikudagin, tá koyrandi var ókeypis gjøgnum Vágatunnilin í samband við ársdagin hjá tunlinum**

HÁTÍÐARHALD
*Edvard Joensen*



*Partafelagið Vágatunnilin hevði gjørt serligt skelti, sum sett varð upp við tunnilsvegin á ársdegnum fyri upplatingini*

*Mynd: Edvard Joensen*

**Vágar:** Tey skutu papageykin í Vágum mikudagin. Fólk av oynni gjørdi rættiliga innrás mikudagin, tá tað var frítt at koyra gjøgnum Vágatunnilin í samband við eitt ára dagin, síðan tunnilin lat upp.

Helst ongantíð síðan tann dagin, Vágatunnilin lat upp, hava so nógvir bilar verið í Vágum í senn, sum teir vóru mikudagin. Serliga seinnapartin og út á kvøldið vóru heilt nógvir bilar í oynni.

Í samráð við Vágatunnilin hevði Kunnigarstovan í Vágum saman við handlunum í oynni skipað fyri, at handlarnir høvdu opið til klokkan ellivu á kvøldi. Hetta gjørdi, saman við fríari koyring gjøgnum undirsjóvartunnilin, at nógv fók nýttu høvið at koyra ein túr vestur at hyggja at, hvat var at fáa í teimum umleið 20 handlunum í Vágum.

Og samsvarandi siga handilsfólk í Vágum, at tey høvdu rættiliga fittan umsetning hendan dagin. Úr tveimum ferðum upp í einar fýra ferðir tað, tey plaga at hava ein vanliga dag, láta tey at.

Tað vóru kortini ikki bara privatbilar, sum feðasðust gjøgnum vágatunnilin í stórum tali mikudagin. Eisini vinnubilarnir nýttu hetta givna høvið at koyra frítt og á tann hát spara væl av pengum.

Sagt verður, at lastbilarnir úr oynni koyrdu dúgliga allan dagin. Bæði við farmi úr oynni og vestur aftur eisini.

Virkir í vágum lótu at mikudagin, at rættiliga fitt av vøruvognum og tænastubilum vóru í oynni. Tað var greitt, siga tey, at hesir høvdu lagt til rættis soleiðis, at teir skuldu spara koyringina gjøgnum tunnilin hendan dagin.

Terji Nielsen, leiðari á Kunningarstovuni í Vágum, sigur, at tey løgdu merki til, at rættiliga nógvir bilar uttan kubba fra Vágatunlinum koyrdu í oynni hendna dagin.

– Tað eru so fyri tann allarstørsta partin fremmandir bilar, sigur hann og staðfestir, at flest allir bilar í Vágum hava kubba.

Handlarnir í Vágum siga allir, sum Sosialurin hevur verið í samband við, at tað var heilt nógv fólk inni á gólvinum hendan dagin. Og tað var fremmant fólk, siga handilsfólkini samsvarandi. Onkur sigur seg hava hitt fólk ymastaðni úr Eysturoynni og serliga úr Havn. Vágafólk hinvegin vóru iki so nógv fleiri enn vanligt, hóast opið var til út móti miðnátt.

– Tað er stuttligt at staðfesta, at hetta tiltakið hevur vakt ans aðrastaðni, sigur Terji Nielsen, kunningarleiðari. Eitt nú at handlarnir í Havn høvdu eitt móttiltak, um vit kunnu siga so, har teir lýstu í bløðunum og bjóðaðu vágafólki til Havnar at keypa, hendan dagin, frítt var at koyra gjøgnum tunnilin.

Sum skilst var onkur, sum tók av hesum tilboðnum og fór av oynni at gera síni ørindi. Men eigin ivi er um, at tað vóru heilt nógv fleiri, sum komu vestur um Sundið at forvitnast og keypa.

Og tað var alt møguligt, fólk keyptu ein slíkan dag. Serliga jólagávur, sum vera man, men eisini jólapynt, klædnavørður og so sanniliga eisini mjólk og breyð, nú tey kortini vóru her, siga handilsfólk í Vágum frá.

Í handlinum hjá Føroya Keypsamtøku í Miðvági var heilt nógv fólk til handils, siga tey. Og tað var mestsum alt fremmandafólk, sum vitjaði um dagin. Men vágafólk komu at gera síni vanligu innkeyp um kvøldið, siga tey í Keypsamtøkuni.

Fólk, sum vóru í handlinum hendan dagin, keyptu í stóran mun jólagávur, siga tey frá. Tey vóru komin at forvitnast og keypa slíkt, tey kanska ikki hava fingið aðrastaðni.

Tað var selt væl av leikutoyi, siga starvsfók í Keypsamtøkuni í Vágum. Lego varð til dømis selt fitt av. Klæðum og øðrum jólagávum eisini. Og so køksbúnýti, pottar og pannur, vóru tað fleiri, sum keyptu. Og tá fólk nú kortini vóru i handlinum, var eisini keypt slíkt sum melis og margarin og aðrar matvørur.

– Tað var viðhvørt so trongt, at vit sluppu ikki út í handilin við vognunum at seta nýtt aftur á hillarnar, sigur eitt av starvsfólkunum í Keypsamtøkuni.

Sama lagið var hjá handilsvirkinum N. Niclasen í Sørvági. Har var heilt nógv fólk og keypti jólagávur og jólapynt. Tó siga tey, at tann stóra innrásin var ikki fyrr enn eftir klokkan trý seinnapartin. Men tá var afturfyri rættiliga trongt í handlinum alla tíðina, til latið varð aftur klokkan ellivu á kvøldi.

Matvøruhandilin í Bartalsstovu í Sandavági varð eisini væl vitjaður mikudagin, siga tey frá.

Hagar komu fólk, sum gingu millum hinar handlarnar í bygdini, eisini inn at forvitnast, og fleiri teirra nýttu so høvið at keypa tað, tey dagliga brúka. Og onkur jólagáva varð eisini seld hendan dagin.

Hotel Vágar varð rættiliga lagt undir trýst mikudagin. Út í eitt frá miðdegi til út móti midnátt var fult, siga tey á hotellinum. Um dagin ótu fólk døgurða, og um kvøldið var tað eitt serligt jólasjálvtøkuborð, hotellið hevði at bjóða, og sum tóktist væl umtókt. Fólk stóðu í bíðirøð fyri at sleppa fram at borðunum, og fleiri høvdu biðið um borð frammanundan, verður sagt av Hotel Vágum.

Hóast ferðsluproppur var ymsastaðni í oynni onkra løtu, og á stóð at finna parkeringspláss, eru handilsfólk í oynni samd um, at tiltakið átti at verið roynt aftur.

Vágatunnilin hevði ikki gjørt upp, áðrenn blaðið fór til prentingar, hvussu nógvir bilar fóru gjøgnum tunnilin hetta samdøgurði, koyrandi var fyri einki. Men millum klokkan sjey á kvøldi og miðnátt, mettu tey, at einir 2.000 bilar koyrdu gjøgnum tunnilin.



# Jól í Atlantis

**Um vikuskiftið fer Klaksvíkar Sjónleikarafelag at hava eitt jólatiltak við søgum, leiki og sangi fyri børnum**

SJÓNLEIKUR
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

**Klaksvík:**
Tað eru tvey ár síðani, at felagið seinast hevði ein jólaleik á skránni. Leikurin í ár fer fram eftir sama leisti, sum tann fyri tveimum árum síðani. Talan er ikki um ein leik, men heldur um frásøgn av jólasøgum, sangframførslur og felagssang. Tiltakið kemur at vara umleið ein tíma. Kjarnin er ein nissufamilja, sum sigur frá søgunum og sangurin gongur eisini fyri seg ígjøgnum tey. Nissuparið verður spælt av Adelborg Linklett og Mogens Højsted. Av øðrum sum verða við, kunnu nevnast Heidi Vágsá og Eliesar í Pálsstovu, sum fer at taka sær av felagssanginum. Eisini fara tey bæði Arnfríð Lützen og Karl Martin Samuelsen at framføra nakrar sangir.Tiltakið er mest ætlað børnum, og verður á skránni fimm ferðir komandi vikuskiftið. Í kvøld klokkan 19, og leygar- og sunnudagin klokkan 16 og 18.

Atgongumerki kunnu fáast í Atlantis ein tíma undan sýning á tlf 456900.



### Skemtileikur

Samstundis sum venjingarnar til hetta jólatiltakið hava verið, fóru venjingarnar til skemtileikin hjá felagnum hetta leikárið í gongd. Talan er um ein skemtileik, sum eitur Marius og Kaktus.

Átta leikarar venja undir serkønu hondini hjá Ega Dam. Frumframførslan av hesum leikinum verður væntandi um mánaðarskifti januar/februar.




